## DAGSINS MEINING

# Vælferðartænastur á A, B ella C-støði?

Tað restar peningur í hjá heimarøktini, og summar tænastur hava verið skerdar síðani í summar. M.a. hava nógv eldri mist hjálpina at gera reint, og í Degi og Viku týskvøldið sóu vit 86 ára gamlan mann dustsúgva heimið hjá sær. Hann harmaðist um, at hann hevði mist heimarøktina, sum annars kom ein tíma um 14. hvønn dag.

Sjálvandi orka nógv eldri at halda síni hús. Og tað er kanska gott fyri tey at røra limirnar, um tey annars orka. Men seinastu mánaðirnar hava sjálvt fólk, sum tátta í 90 árum, mist hjálpina at gera reint. Eisini hóast heilsuverkið hevur álagt teimum ikki at fáast við reingerð. Og tað kann ikki vera rætt, tá reingerð bara kostar eitt-tvey prosent av útreiðslunum hjá heimarøktini, sum tilsamans fær játtaðar 92 mió.kr. Hóast samlaða almenna útreiðslustøðið ikki kann hækka, so má raðfestingin broytast, og spardi peningurin koyrast í tær tænasturnar, ið eru hornasteinarnir undir vælferðarsamfelagnum.

Í hesum viðfangi skulu vit ikki koma inn á spurningin, hvussu væl leiðslan dugur at húsast við játtanini ella ikki, tí tað skal hon duga, annars er hon ikki skikkað. Hinvegin mugu vit eisini til at lurta eftir henni. Heldur skuldu vit venda til orðini og spurningin hjá landsstýrismanninum í almannamálum, um vit skulu hava eina heimarøkt á A, B, C ella kanska D-stigi.

Nei, rætt hevur Páll á Reynatúgvu. Henda spurningin hava vit ikki umrøtt áður. Allarhelst tí at ein dyggur meiriluti í Løgtinginum hevur verið fyri, at vit skulu hava eina so góða heimahjálp, sum tilber. Partar av teimum borgarligu flokkunum kundu kanska funnið upp á at seta spurnartekin við, um vit skulu hava eina heimarøkt á A, B ella C-stigi. Men at tað skuldi koma frá einum tjóðveldismanni kom heldur óvæntað, hóast "tann nýggi" Tjóðveldisflokkurin verður alsamt meira borgarligur.

Vandi er í allari vælferð, og vit kunnu altíð seta spurnartekin við, um hetta ella hatta er neyðugt, ella um vit kunnu spara okkurt. Men tað eru nakrir grundleggjandi tankar og hugsjónir í hesum partinum í eldrapolitikkinum. Ein er, at tey eldru skulu vera sum longst í sínum heimi. Ein annar tanki er, at okkara gomlu, sum hava bygt upp vælferðarsamfelagið, skulu hava eini góð ellisár og fáa hjálp - annaðhvørt til kropsliga røkt ella at hjálpa til í heiminum.

Hesa hugsjón skulu vit halda fast um. Vit fara neyvan at nøkta tørvin á ellis- og røktarheimum, ella tørvin á vardum íbúðum ella eldraíbúðum, tey næstu mongu árini og tí skulu vit hava eina góða heimarøkt. Heimarøktin má eisini altíð verða eitt tilboð til tey, ið eru før nokk at búgva heima. Vit skulu hvørki tosa um C ella D-støði. Men Tjóðveldisflokkurin hevur lagt upp til kjak og tað næsta uppkastið til orðaskifti verður kanska, um vit skulu hava vælferðarsamfelagið á A, B, C ella D-stigi? Er Tjóðveldisflokkurin linkaður so mikið í knøunum, nú hann mælir til, at vit gera upp, um vit skulu hava vælferðartænastur á A, B ella C-støði? Og kanska sleppa tí norðurlendska støðinum?

Um so er, so má ásannast, at rætturin, ið formaður Tjóðveldisfloksins tosaði um uppundir valið, er lítið verdur.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Bussleiðin – hugsið øðrvísi

**Marni Mortensen**
*Ein púra vanligur havnarborgari(?)*

Síggi at Leivur Hansen ger viðmerkingar í Dimmu fríggjadagin 19. sept. til eitt lesarabræv í Dimmu 17. sept. Hugaligt at onkur endiliga torir at taka busleiðina í Havn alment uppá tunguna. Veit eisini at Jógvan Arge mutaði ímóti "nýggju" bussleiðini fyrr í ár. Hóast Leivur og Jógvan eru í andstøðu í býráðnum og kanska bara skulu vera ímóti eins og vanligur politiskur siður er her í landinum og skora nakrar bíligar atkvøður, so er tað gott allíkavæl, at onkur hevur eina meining um evni. Havi við áhuga lisið tað mesta av tí, ið er skrivað um bussleiðina síðani býráðið bjóðaði leiðirnar út til privat at reka.

Hjá undirritaða hevur bussleiðin verið sera hent seinastu árini, ikki minst tí eg búgvi og arbeiði uttan fyri býin, umframt tann veruleikan at eg rætt og slætt ikki havi nakran áhuga í at eiga bil og allar trupulleikarnar, ið standast av einum slíkum - ikki minst teir fíggjarligu. Bussleiðin er ikki dýr at brúka eftir míni metan, og bussarnir eru rættuliga álítandi við kompetentum sjaførum fyri tað mesta, so tað er ikki tað, ið fær meg at skriva hesar reglurnar.

Men tað er, sum "Bussferðamaður" skrivar í sínum lesarabrævið 17. sept., at leiðirnar eru snøgt sagt ikki nøktandi longur - um tær nakrantíð hava verið tað. Eg hugsaði mítt, tá eg hoyrdi borgarstjóran fyrr í ár í fjølmiðlunum aftan á nýggju bussavtaluna ógvuliga skrásikkurt breggja sær av, at býurin nú hevði fingið eina betri bussleið fyri minni pengar - og øll sum mutaðu ímóti vóru bara órealistisk grenj. Tað er jú tað reina møsn, og tað veit Jan Christiansen eisini væl - ella tað burdi hann í hvussu so er. Tað ber snøgt sagt ikki til at spara 3,5 mió. uppá eina bussleið, sum longu áðrenn hetta var ónøktandi og vænta, at nú verður hon betri!?! Tað kanst tú billa inn í ommu tína, Jan! Møguliga fingu tey á Argjum eina betri tænastu, og alt gott um tað, men hvat við øllum hinum? Ikki minst tey í Hoyvík? Tænastustøði har er elendigt í løtuni, sum eisini "Bussferðamaðurin" væl lýsir í sínum lesarabrævið. Hatta er bara Føroya Tele taktikkurin umaftur, tey kunnu ikki geva øllum brúkarum eitt betri tilboð uttan at takað nakað frá øðrum samstundis. Tað er bara ikki nakað veruligt tilboð!

Veruleikin er, at flestallir býráðslimir, núverandi og fyrrverandi, nærum ongan veruligan áhuga hava í bussleiðini til "vanliga fólki". Havi sjálvur práta við býráðslim, sum bara dugdi at síggja bussleiðina sum krónur og oyrur - eina útreiðslu. Tænastan til borgaran og nøkur visjón um bussleiðina var ikki at hóma. Eg meini so við, hvør býráðslimur brúkar bussin dagliga - fyri ikki at tosa um í vikuskiftinum? Hevur tú nakrantíð sæð nakran teirra í einum býbussi? Og munnu børn teirra ikki eisini verða koyrd har tey skulu í bili? Um teir altso ikki búgva mitt í býnum (undantikið Leivur Hansen sum er ein brandur at ganga!) og als ikki hava slíkar trupulleikar sum vit vanligu útjaðaraborgarar. Hví skulu vit hoyra býráðið gremja seg um nógva trafikkin og skitnað býin, tá tey ikki sjálvi vilja vera við til at skapa býnum eitt veruligt alternativ?

Núverandi og fyrrverandi bussleið er einki sum bara líkist einum veruligum alternativi til alt ov nógvu ferðsluna í býnum. Tosað verður bara um krónur og oyrur - sum sjálvandi eru týdningarmiklar, men álvaratos, væntar nakar í býráðnum, at bussleiðin skal geva yvirskot? Hetta er ein tænasta, sum vit havnarborgarar gjalda skatt fyri og hava krav uppá.

Kann býráðið bara umrøða bussleiðina sum krónur og oyru? Eru ongar visjónir um at veita eina betri tænastu - eg hugsi serliga um eina øðrvísi tænastu? Vælsignaði hugsið nýtt og annarleiðis. Bussarnir sum koyra í Havn eru yvirhøvur ikki egnaðir at koyra her. Teir eru alt ov stórir og fara illa við býnum, koyra á annanhvønn kant og skulu bíða leingi við hvørt horn og hvørja útkoyring fyri at sleppa víðari. Onkutíð mást tú beundra sjaførarnar, sum koyra dagliga undir slíkum umstøðum og harumframt berjast við ein alt ov samanpressaðan tíðarplan. Hví ikki hava fleiri smærri bussar, sum koyra oftari (kanska ikki neyðturvuliga eftir einum ávísum minutttali) og longri um dagarnar - hvønn dag í vikuni? Er tað veruliga so nógv dýrari? Onkur størri bussur kundi koyrt um morgunin og seinni um dagin í samband við skúlagongd og arbeiði. Hví ikki eitt sindur av fleksibiliteti? Skulu bussarnir vera so stórir, bara tí onkrir barnavognar skulu uppí av og á? Tað má kunna loysast onkursvegna, tí sjálvsagt skulu fólk við barnavogni hava henda góða møguleikan. Tímir býráðið bara ikki at hugsa nýggjar leiðir og um at veita borgarunum, sum av ymsum orsøkum ikki hava bil - eitt nú børn, lesandi, gomul v.m. - eina betri tænastu? Har er kanska ikki stórvegis av atkvøðum at heinta?

Ein heilt annar trupulleiki við bussleiðini í Havn er, at hon er komin alt, alt ov seint. Tað er næstan ongin bussmentalitetur av tí sama, og tað er nærum vónleyst at uppbyggja ein tílíkan, tá býráðið ikki tekur spurningin í álvara og hevur nakað veruligt at bjóða sínum borgarum. Hevur eingin samgongulimur í býráðnum nakra sum helst meining? Er tað bara fíggjarnevndin sum avgerð alt, tí býráðið bert má hugsa um pengar? Tosa um tunnlar til Havnar og stór, dýr parkeringspláss mitt í býnum. Hví ikki gera okkurt munagott - og kanska enntá bíligari - við bussleiðina fyrst heldur?

VARPIÐ
Skráir og ummælir
Hvønn fríggjadag
20 síður heft, - so tað heldur alla vikuna
SvF • DR1 • DR2 • BBC Prime • Canal+ • Canal+ Gul • Canal+ Blá • TV Danmark 1 • TV Danmark 2 • 3+ • DK 4 • TV 1000 • TV3 dk
Animal Planet • BBC World • CNN • Cartoon Network • Discovery Channel • Euro Sport • MTV • National Geographic
TCM • Travel Channel • VH1 • TV2 Zulu • GOD Channel • Lindin • Útvarp Føroya • Rás 2

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Durita Simonsen durita@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo
Ingrid Bjarnastein ingrid@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Solby Eliasen solby@sosialurin.fo
Dagfinn Olsen dagfinn@sosialurin.fo
Ingi Rasmussen ingi@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 220727
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo
**Sosialurin í Eysturoy:**
Postsmoga 143, Saltangará
tel. 447820 fax 449520
tel. 225429
e-post: vilmund@sosialurin.fo
**Sosialurin í Vágum:**
360 Sandavágur
tel. 333820, 220507 fax 333720
e-post: edvard@sosialurin.fo
e-post: vagar@sosialurin.fo

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.



# Føroyar í kreppustøðu?

TÍÐINDASKRIV
*frá Filadelfia*

" Í 80´unum ,eg livi, syngi og skrivi …" - tóku Frændir til á sinni. Fólk vilja vera við, at hesi orð hóska væl til dagsins livihátt, í ovurnýtslu, bæði á tí persónliga og samfelagsliga økinum. Eru vit á somu leið nú, móti enn einum skrælli?

Dagsins trupuleikar í alivinnuni, rækjuflotanum, samgonguni og í fullveldisgongdini, eru bert nakrir av fáu trupuleikunum vit hoyra um dagliga . Sannleikin í hesum málum kann ikki noktast, men hvussu langur skal listin verða, og hvussu leingi skal hetta halda á?

Hvat skal til fyri at bøta um støðuna í landi okkara? Sterkari javnstøða, aðra samgongu, positivari mentala venjing?

Vit minnast kreppuna í 90´unum! Hvat var tað sum bjargaði okkum? Jú, tað at vit fóru á knø, og bóðu Gud um fyrigeving fyri at vit, Hansara fólk, høvdu forsømt Hann og tað verk Hann hevði sett okkum til. Noyðast vit at síggja enn eina kreppu, áðrenn vit fara niður aftur á knø? Vit minnast at Gud svaraði okkum, so fiskifrøðingar og onnur lærd fólk standa enn í dag og undrast á hvar fiskurin kom frá.

Vit eru vís í, at Samkoma Guds er vón Føroya. Vit muga reisast at verða sterk í Gudi, og standa saman um at broyta land okkara. Nú er tíðin búgvin til júst tað. Í hesum sambandi skipar Filadelfia í Havn fyri einari heyststevnu fyrsta vikuskifti í oktober. Evnið á stevnuni er: "Vón Føroya: Kristus í tær".

Møtir verða alt vikuskiftið, og fyrireikarnir siga at karmarnir um stevnuna eru sera familjuvinarligir. Leygardag seinnapart verður nógv ymiskt á skránni. Skipað verður fyri bowling, ríðing, svimjing, fótbólti og gongutúri í gomlu havnini við ferðaleiðara. Spennandi tiltøk fyri børn verða eisini. Góð gistingartilboð frá gistingarstøðum í Havn eru eisini útvegað.

Kunning um møtir, prísir og annað viðv. heyststevnuni 2003, er at síggja á www.filadelfia.fo. ella tlf. 314828-211067.

# Skótahjálpin 20 ár

TÍÐINDASKRIV

Árliga Skótahjálpin verður í døgunum 20. - 27. september 2003. Hetta er 20. árið, Skótahjálpin er. Í ár verður aftur veittur stuðul til tvær verkætlanir - eina føroyska og eina útlendska.

**Føroyska verkætlanin - stuðla MBF**
2003 er kosið at vera ár teirra brekaðu. Føroyska verkætlanin fer tí í ár at stuðla Meginfelag teirra Brekaðu, MBF, at endurprenta og geva út eina vegleiðing við heitinum "Til heim við brekaðum børnum."

Tá ið Ár teirra brekaðu var í 1981, tók ein av bólkunum, ið tá varð settur, stig til at lýsa, hvørji tilboð vóru til heim við brekaðum børnum. Hesin bólkur gjørdi eitt stórt arbeiði at lýsa umstøðurnar og at finna fram til, hvørji tilboð vóru. Funnið varð fram til, at nógv tilboð vóru, men tvørrandi samstarv millum stovnar og verk gjørdi, at foreldrini sjálvi ofta skuldu renna frá Peri til Pól fyri at fáa hjálp.

Bólkurin gav út báklingin "Til heim við brekaðum børnum". Hesin bóklingur var sera hentur hjá foreldrum, bæði tí hann lýsti, hvør hjálp var at fáa, og tí hann kom við tilráðingum um, hvat kundi verið gjørt øðrvísi.

Síðani tá er nógv broytt, og nú eru fleiri tilboð, men enn er sera trupult at finna fram til, hvussu og hvar tey verða givin. Feløg í MBF hava tí leingi havt eitt ynski um at fáa eina heildarloysn til børn við breki.

Í sambandi við, at 2003 aftur er lýst at vera ár teirra brekaðu, fer stýrisbólkurin fyri árið at skipa fyri einum temadegi í oktober um heildarloysnina, og hvussu hon kann verða skipað. Allir partar í málinum hava ásannað, at tørvur er á eini tílíkari skipan. Temadagurin kemur vónandi at vísa, hvussu henda loysn skal verða.

Stýrisbólkurin ger síðani ein nýggjan dagførdan bókling við upplýsingum um tilboð til heim við brekaðum børnum sum byggir á tað, sum kemur fram á temadegnum.

**Útlendska verkætlanin - stuðla skótum í Nepal**
Í vár fingu vit samband við ein gamlan KFUM-skóta, Jan á Argjaboða, ið hevði verið í Nepal og arbeitt. Har var hann komin í samband við skótarørsluna m.a. ein rovarabólk nærindis høvuðsstaðnum Katmandu.

Ein stórur trupulleiki hjá teimum er, at eingi høli eru til skótaarbeiðið í Nepal, og at teimum vantar næstan alla útgerð. Hesir skótar royna at byggja hús og at keypa útgerð, so teir kunnu menna skótavirksemið í hesum økinum og í Nepal sum heild.

Skótahjálpin hevur í ár gjørt av at lata útlendsku verkætlanina vera at stuðla arbeiðinum hjá hesum skótunum í Nepal. Jan á Argjaboða hevur boðið sær til at fylgja við í arbeiðinum. Roynt verður eisini at fáa ein bólk av rovarum og ungdómsskótum at fáa áhuga í hesum arbeiði, so samstarv møguliga kann fáast millum skótarnar í Føroyum og skótarnar í Nepal.

## VIÐMERKINGAR

Rættleiðing til grein í Dimmalætting nr. 161, 28. august 2003:

# Grovur mismunur á serundirvísing í føroyskum skúlum

**Hans Eli Dahl**
*stjóri*



Í Dimmalætting nr. 161, 28. august 2003 er greinastubbi: Grovur mismunur á serundirvísing í føroyskum skúlum.Greinin skal vera grundað á samrøðu við undirritaða dagin fyri. Av tí at endurgevingin í støðum er heilt burturvið, og av tí at leiðarin í Dimmu dagin eftir er grundaður á sama, er neyðugt við eini rættleiðing.

Greinin byrjar: "Vanlig børn við serligum tørvi í føroysku fólkaskúlunum eru við skerdan lut á ymsum skúlum kring landið. Talan er ikki um børn við breki, men um vanlig børn, hvørs einasti trupulleiki er, at tey hava ilt við at læra at lesa, skriva ella rokna og tí skulu hava eitt sindur av eyka hjálp í onkrum faki".

Longu her skilst, at ikki hevur eydnast undirritaða at hjálpa blaðmanninum til innlitið, ið er krevst til grundarlags undir grein um hesi viðurskifti.

**Miðfirrað (vanlig) serundirvísing**
Heitið vanlig børn verður ikki brúkt í sernámsfrøðini. Harafturímóti kann ein hoyra um "vanliga serundirvísing". Í fyrisitingini verður henda nevnd miðfirrað serundirvísing. Hesa leggja skúlarnir sjálvir til rættis eftir tørvi næminga og við teim tímum, ið eru til taks. Hesir tímar eru íroknaðir vanliga pultstímatalinum, ið av Mentamálaráðnum verða játtaðir skúlunum. Burtur av hesum tímum eigur skúlin til hetta endamál at brúka 0,11 t/ v faldað við næmingatali skúlans. Ein skúli við t. d. 40 næmingum eigur sostatt at brúka 4, 4 tímar um vikuna til miðfirraða (vanliga) serundirvísing. Teir næmingar, ið fáa hesa, hava ikki serligan tørv. Teir bera ikki brek men hava ávísar lærutrupulleikar, ið gera, at teimum tørvar nakað av eyka undirvísing, ið er serliga lagað teimum.

**Serligur tørvur**
Næmingar við serligum tørvi eru teir, ið bera brek. Teir kunnu vera illa fyri í sansing, likamligari- ogella sálarligari menning, kunnu vera fjølbrekaðir ella álvarsliga darvaðir á annan hátt.

Til sernámsfrøðilig tiltøk fyri hesar næmingar fær skúlin serskilta játtan frá Sernásmsdeplinum. Tímarnir vegna serligan tørv eru oyramerktir einstøku næmingunum ella 2 — 3 næmingum á liði.

**Mismunur og ónøktandi tímatal**
Torført man vera at finna eina játtanarskipan og eitt tímatal, ið øll vera nøgd við. Hóast ávíst orðaskifti hevur verið, og hóast fleiri hava gjørt vart við ónøgd um skipanina, so hava Landsskúlafyrisitingin, seinni Mentamálastýrið og nú Mentamálaráðið higartil ikki hildið, at núgaldandi skipan hevur elvt til mismun á tilboðum um serundirvísing í teim ymsu skúlunum.

# Eg skammist ikki við evangelium Kristusar Rómbrævið 1:16

**Christian Fróði Djurhuus**

Mangir vóru á Paulusar døgum, eins og á okkara døgum, ið skammaðust við evangelium Kristusar, tóat teir hildu upp á at prædika og verja tað.

Hvør skammast við evangeliið? Teir sum fjala og dylja tað fyri menniskjum – teir sum hava førleikan og møguleikan at prædika tað, men velja ikki at gera tað – allir ið prædika, men prædika ikki evangeliið – allir ið prædika evangeliið fyri ein part, men nokta at prædika tað við nágreinileika – teir ið kennast við tað persónliga, men sum nokta at prædika alment – teir, ið brúka tvítýdd orð og setningar, og eru varnir um at ikki at særa hoyrarar sínar við sannleika Guds – við fáum orðum, eitt og hvørt menniskja sum søkir eftir at toknast menniskjum við prædiku síni, sum formar boðskap sín fyri at vinna lov og rós frá hoyrarum sínum, sum noktar at taka á seg vanvirðing Kristusar, fyri eina og hvørja grund, skammast við evangeliið. Og ein og hvør prædikari, sum skammast við evangeliið, er ein svikaprofetur.

Tænarar Guds skammast ikki við evangeliið. Teir gleðast í tí! Tænarar Guds prædika trúfastir útveljingar-kærleika, fría frelsu og stóra náði, fyri almenningi og við dirvi, í andstøðu, uttan at undirhalda teirra egnu persónligu áhugamál.

Og evangeliið vit prædika er evangelium Kristusar. Tað er evangeliið ið Kristus prædikaði tá ið hann var í heiminum. Tað er evangeliið, sum vit lærdu frá Honum. Og tað er evangeliið, har Jesus Kristus er høvuðsinnihaldið og aðalevnið. Tað er einki annað evangelium! Evangeliið er ein kunngering av Jesu Kristi dýrdarríka persónleika. Hann er hin alvaldi Gud, ið ikki kann lúgva. Og Hann er menniskja. Kristus er Gud-menniskjað sum kom fyri at frelsa fólk Sítt frá syndum teirra. Evangeliið er ein staðfesting av fullgjørdari frelsu. Kristus Jesus, við úthelling av blóði Sínum hevur strikað út syndir fólks Síns. Ikki ein av hesum syndarum sum Hann doyði fyri, kann undir nøkrum umstøðum, fortapast. Evangeliið er ein kunngering av Kristi frelsandi kraft. Hann er førur fyri at frelsa teir handastu ið koma til Gud við Honum. Og øll sum Hann kom fyri at frelsa skal hann geva Gudi. Evangeliið er opinberingin av Kristi upphevjan og dýrd. Sonur Guds, Frelsari okkara, ræður í fullkomiligum einaveldi, so Hann kundi geva ævigt lív til alt útvalda og endurloysta fólk Sítt. Hann kann ikki lúgva! Tann Kristus sum vit líta á, tann Kristus sum vit tilbiðja, tann Kristus við prædika er ein einavaldandi, eyðin og frelsandi staðgongumaður.

*Ymsar keldur.*